GJALDSTOVAN

## Roknskaparárið 2024 latið aftur

Gjaldstovan hevur nú latið aftur fyri skrásetingum á roknskaparárið 2024, og roknskaparútskriftir fyri tíðarskeiðið 13-24 eru sendar stovnum.

Verða stovnar varugir við týðandi skeivleikar í roknskapum sínum, skulu teir skjótast gjørligt seta seg í samband við Gjaldstovuna fyri at rætta møguligar skeivleikar. Týðandi skeivleiki merkir, at uttanhýsis roknskaparlesari fær skeiva fatan av roknskapinum, verður skeivleikin ikki rættaður.

Flytingar millum innanhýsis útgreiningar í roknskapinum (støð, endamál, verkætlanir) eru ikki týðandi skeivleikar fyri uttanhýsis lesaran. Harafturímóti eru vantandi skrásetingar av stórum inntøkum og útreiðslum, herímillum skeiv ella vantandi tíðaravmarkan at rokna sum týðandi skeivleiki.

Kvíggjartún 1 | Postsmoga 2009 | FO-165 Argir | Tlf. (+298) 352400 | gjaldstovan@gjaldstovan.fo